# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# ÁRSINS BILUR Í DANMARK 2010

Motorjournalisternes Klub Danmark hevur kosið nýggja Ford C-Max sum ársins bil í Danmark 2010.

Tilsamans 21 bilarnir vórðu testaðir og sammettir á Jyllands Ringen, nærhendis Silkeborg.

Teir 25 limirnir í dómsnevndini valdu Ford C-Max sum fekk 146 stig til nummar eitt, og nummar tvey varð Alfa Romeo Giulietta við 131 stigum, og nummar trý varð Audi A1 við 118 stigum.




*Ford C-Max er kosin ársins bilur í Danmark 2010*




*Páll Danielsen, sølumaður hjá Auto Service, presenterar nýggja Nissan Juke*

# Nissan Juke presenteraður í Føroyum

Bilasølan hjá Auto Service var opin leygardagin í sambandi við at nýggi Nissan Juke varð presenteraður.

Nissan Juke er ein sonevndur crossover, sum ikki líkist nøkrum øðrum bili á marknaðinum.

Bilurin er eyðkendur av, at hann er høgur frá vegnum við stórum hjólum og breiðum dekkum.

Designið er nakað heilt fyri seg í sportligum stíli við flott designaðum skermkassum.

Meira um bilin í Mánaðarblaðnum hjá Sosialinum sum verður borið í hvørt hús í landinum mánadagin 25. oktober.




## BILRADIO

Aktuel biltíðindi við Maggi Gunnarsson

### Hósdagin 21. oktober kl. 17.10

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 17.10 verður nýggi Nissan Juke royndarkoyrdur saman við Páll Danielsen, sølumanni hjá Auto Service. Eisini fortelur Fríðrikur Bláhamar frá First Stop um eina vitjan á Ferrari verksmiðuni í Maranello í Italia. Seinast í sendingini verður vitjað hjá Triv á Hjalla, har stjórin Óli Mortensen sigur frá um fyritøkuna og um sítt samband við Italia.